

## Bassleikari í Skansastovu

Masterclass við tí heimskenda bassleikaranum Lars Danielsson nú mikukvøldið 6. august klokkan 19 verður flutt til Skansastovu í Havn, upplýsa fyrireikararnir. Lars fer at greiða frá, hvussu hann venir og fyrireikar seg til sínar tónleikauppgávur og kemur við dømum um spælihættir innanfyri tónleikastílar. Eisini gevur Lars góð ráð um, hvussu ein tónleikari skal verða fyri at klára seg í tónleikaheiminum, og hvørjum hann hevur spælt við. At enda svarar hann eisini spurningum. Atgongumerkir fáast til keyps í Elding í Havn, Saltangará og Klaksvík og við dyrnar í Skansastovu frá kl. 18.30.

# Floksleiðslan friðhalgar løgmann

**Yvirlýsingin frá floksleiðsluni í Javnaðarflokkinum gevur fólki fatan av, at formaðurin er hevjaður upp um allan kritikk, heldur Dan R. Petersen, fyrrverandi tinglimur fyri Javnaðarflokkin**

POLITIKKUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Í lesarabrævi í blaðnum í gjár undrast fyrrverandi tinglimurin fyri Javnaðarflokkin, Dan R. Petersen yvir, at floksleiðslan, við gundsjónarmiðunum hjá Javnaðarflokkinum í hondini, sigur seg stuðla formanninum í flokkinum, Jóannes Eidesgaard.

Sambært Dan R. Petersen er hendan yvirlýsingin enn eitt dømi um, at tað alt ov sjáldan verður sett spurnartekin við førda politikkin í Javnaðarflokkinum.

- Eftur mínum tykki kann hendan yvirlýsingin bara tulkast sum, at tað ikki longur er loyvt at finnast at formanninum í flokkinum. Eg sigi ikki, at vit ikki skulu stuðla formanninum. Men tað merkir ikki, at formaðurin er hevjaður upp um allan kritikk, sigur Dan R. Petersen.

### Vilstur Javnaðarflokkur

Tað fellir Dan R. Petersen serliga fyri bróstið, at floksleiðslan við yvirlýsingini gevur fólki fatan av, at stuðulin er í tráð við grundsjónarmiðini hjá Javnaðarflokkinum.

Sambært Dan R. Petersen er ein loysingarsinnað høgrasnaring farin fram í javnaðarflokkinum seinnu árini, ið á ongan hátt er í tráð við javnaðarhugsjónina, og sum hann hevur sera ilt við at kenna seg aftur í.

Sum dømi nevnir hann, at fullveldið týðiliga er komið lúrandi inn í flokkin undir verandi leiðslu, samstundis sum privatiseringar og áhaldandi fráboðanir um at avtaka sjómannafrádráttin eru greið tekin um eina høgrasnaring í flokkinum.

- Men hvat skulu vit við einum nýggjum høgrasinnaðum loysingarflokki, tá vit longu hava Fólkaflokkin, spyr Dan R. Petersen, sum illa dugir at síggja annað enn, at Javnaðarflokkurin er komin í eina álvarsliga samleikakreppu.

Eisini harmast Dan R. Petersen um, at hetta hendir, uttan stórvegis kjak. Hann vísir í hesum viðfangi á, at kjakfundirnir og temadagarnir, sum fyrr góvu limunum møguleika at vera við til at forma førda politikkin, ikki eru til longur.

- Úrslitið er eitt slag av politiskum sjálvdrátti, har tey, sum mynda flokkin, eftir øllum at døma ikki geva sær far um meiningarnar hjá vanligu limunum í flokkinum, sigur Dan R. Petersen, sum kortini ikki hevur mist vónina um, at Javnaðarflokkurin aftur fer at fóta sær ideologiskt.

- At leiðslan í Javnaðarflokkinum er farin at vingla í trúnni, merkir ikki, at eg eisini havi mist trúnna uppá tørvin á einum veruligum javnaðarflokki. Tí gleði eg meg eisini til landsfundin, tí eg kann ikki trúgva annað enn, at tað ideologiska kjakið aftur kemur á breddan tá, sigur Dan R. Petersen.



*- Hvat skulu vit við einum høgra- og loysingarsinnaðum Javnaðarflokki, tá vit longu hava Fólkaflokkin? spyr Dan R. Petersen, fyrrverandi tinglimur fyri Javnaðarflokkin*

# Samgongan hildin gísli

**Samgongan er ongantíð sloppin til arbeiðis, tí persónsmál og einkultmál hava fylt alt ov nógv, heldur formaðurin í Tjóðveldi, sum vónar, at politikkurin nú kemur aftur á dagsskránna**

POLITIKKUR
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Gerhard Lognberg hevur hildið samgonguna sum gísla í einum máli, har hann ongan vilja hevur víst til at finna nakra loysn. So hvassorðaður er formaðurin í Tjóðveldi, Høgni Hoydal um samgongustevið fyrstu seks mánaðarnar hjá CHE samgonguni.

- Allir samgonguflokkarnir ynskja at styrkja útjaðaran og binda landið saman við bøttum samferðslukervi. Tí er tað púra burturvið, at Gerhard Lognberg skal lata sum um, hann er tann einasti, sum vil hava Sandoyartunnil. Tað einasta, hann hevur gjørt, er at rópa upp og krevja, sigur ein bersøgin Høgni Hoydal.

Hann vísir á stórar íløgur til útjaðaran og staðfestir, at søgan hevur víst, at tað Føroyar hava ráð til eitt gott samferðslukervi. Men íløgurnar mugu gerast við fíggjarligum skili.

- Fígging skal til. Men Gerhard Lognberg hevur ikki viljað arbeitt konstruktivt við, hvussu Sandoyartunnilin skal fíggjast, staðfestir Høgni Hoydal.

- Og at hann so brúkar Løgtingsins røðarpáll at spilla alla samgonguna út er so langt úti, at eg eri framvegis ikki komin yvir tað.

### Politikkurin druknar

Formaðurin í Tjóðveldi vónar, at samgongan finnur eina samstarvsloysn við onkran flokk frá andstøðuni, soleiðis at samgongan aftur verður arbeiðsfør og politikkurin kann koma á skránna.

- Seinasta hálva árið hava persónsmál og einkult mál fylt alt ov nógv. Vit hava brúk fyri at fáa politikkin á skránna. Hjá Løgmanni legði nógv áhugaverd politisk mál fram, men hvat hevur sett dagsskránna síðani? Persónsmál, staðfestir Høgni Hoydal.

Hann vónar, at samgongan við nýggjum samstarvi hevur fingið arbeiðsfrið áðrenn hendan vikan er úti. Tí nógv týdningarmikil politisk mál bíða. Í dag var fiskivinnupolitikkurin á skránni, og skjótt skal fíggjarlógin fyri 2009 fyrireikast.

Høgni Hoydal vil ikki siga, hvønn flokk hann ynskir samstarv við. Men prátið í Tinginum í dag bendi á, at Sjálvstýrisflokkurin verður stuðulsflokkur hjá samgonguni.